tíðindablaðið
**sosialurin**
Nr. 96 týsdagur 23. mai 1995 69. árgangur Krónur 7,00

## AKSEL HANSEN, vinnulívsmaður:

# Skoytti ikki um riddarakrossin

*»Eg frásigi mær 'heiðurin' at vera riddari av Dannebrog og viðleggi ordanin, var viðmerkingin frá Akseli Hansen, sum herfyri gav ríkisumboðsmanninum riddarakrossin aftur*



**síða 3**

## SKATTATØLINI ERU RÆÐANDI:

# Lægri løntu knokkroytt

*Skattatrystið í Føroyum er nógv størri enn í Danmark, og lutfalsliga bera tær lægru inntøkurnar tyngstu byrðarnar. »Politiski málsetningur okkara í samband við næstu fíggjarlóg má vera at seta skattin niður,« sigur Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri* **síða 8 & 9**

# Landsliðsáskoðarar fáa ferðaseðlar fyri hálvan prís

*Strandferðslan hevur tilboðsdag Kristi Himmalferðardag, tá San Marino-dysturin er, og tá kunnu fólk ferðast fyri hálvan prís við bussum og ferjum*

# B68 og HB fult stigatal higartil

***Lesið ítróttin á síðunum 11, 12, 13, 14, 15 & 16***

## TÝÐANDI STIG VÍÐARI Í OLJULEITININGINI VIÐ FØROYAR:

# Fara nú at lurta eftir havbotninum

*Í hesi vikuni fer oljusamtakið »The Atlantic Margin Group« at seta seismiska útgerð á havbotnin við Føroyar*

***Lesið á síðu 5***

*Eitt týðandi stig víðari í oljuleitingini við Føroyar:*

# Fara at lurta á havbotninum

Atlantic Margin Group
Mobil
STATOIL
Enterprise Oil

*Oljusamtakið "The Atlantic Margin Group" við Statoil, Mobil Oil og Enterprise Oil taka í hesi vikuni eitt tað mest týðandi stigið í sambandi við leiting eftir olju og gassi í føroysku undirgrundini. Tey fara at seta seismiska útgerð á havbotnin við Føroyar*




Just í hesi løtu rigga vísindafólk við lærda háskúlan í Bergen seg til at fara undir eina fyri Føroyar sera spennandi og týdningarmikla rannsóknarferð. Talan er um at gera seismiskar upptøkur á sjálvum havbotninum eystan og sunnan fyri Føroyar.

Við rannsóknarskipinum Håkon Mosby fara vísindafólkini at gera sokallaðar "OBS" kanningar.

Tað stendur fyri ON Bottom Seismikk, sum á føroyskum merkir havbotnseismikkur.

Hetta er eitt annað slag av seismikki enn tað, sum amerikanska felagið Western ger við Føroyar í løtuni. Meðan Western tekur ímóti signalunum á sjálvari havyvirflatuni, so verður sjálvt "oyrað" nú sett á havbotnin.

Við sera framkomnari útgerð ber til at fáa eina nógv nágreiniligari mynd av løgunum undir basaltinum enn við 2D seismikkinum hjá Western.

**Kanningin kostar nógvar milliónir**

Talan er um at leiga norska rannsóknarskipið við vísindamonnunum í góðar fýra vikur. Hesa tíðina skulu teir gera tveir tvørskurðir hvør uppá 100 kilometrar.

Vidar Larsen, jarðfrøðingur hjá Statoil sigur við Sosialin, at teir eru sera spentir upp á úrslitið av hesum kanningunum. Talan er um sera kostnaðarmiklar kanningar, ið bæði Statoil og Mobil Oil sum nærum tey einastu feløgini í heiminum havt gjørt royndir við út fyri Miðnoreg og vestan fyri Hetland.

Endamálið við kanningunum er at kanna løgini millum botnin á basaltinum og sjálvt grundfjallið.

Við hesum upplýsingum kunnu teir so fáa holla vitan um sedimentløgini og um hesi eru úr slíkum tilfari sum tey, ið vanliga goyma olju og gass.

Við hesum kanningunum vónar "The Atlantic Margin Group" at kunna fáa eitt nógv neyvari innlit í føroysku undirgrundina, og gongst væl, kunnu teir móti endanum á hesum ári hava onkra ábending um, hvar tað kann vera mest áhugavert at fara undir víðari kanningar og at enda at bora eftir olju.

**Týðandi stig á leiðini**

Vidar Larsen, sum er ein av teimum royndu jarðfrøðingunum, ta tað snýr seg um jarðfrøðina í The Western

*Framhald á síðu 9*

Klementsrud frá AOF í Noregi og Lill Sie Isamail og Roke Lundgren, bæði frá ABF í Svøríki.

Endamálið við skeiðnum var, at Upplýsingarfelagsskapur Verkamanna skal fáa nøkur fólk, sum sjálv eru før fyri at undirvísa.

Undirvíst varð ti í pedagogikki. Tað er ikki tað sama at undirvísa vaksnum sum børnum, tí undirvísingin fyri vaksin sum í hesum sambandinum, byggir eisini á lívsroyndir og at nýta vit og skil, ikki bara at egva frá sær bókliga vitan.

- Vit eru ikki komin higar at fortelja teimum í UV, hvussu tey skulu arbeiða, og hvussu tey skulu menna felagsskapin. Tað mugu tey sjálv gera og laga eftir føroyskum viðurskiftum. Vit vilja bara hjálpa og geva av okkara royndum, siga tey trý, sum láta væl at føroysku luttakarunum, ið hava verið sera ágrýtnir og áhugaðir.

Hini londini hava drúgvar royndir í undirvísing fyri vaksin. Svenski felagsskapurin er 80 ára gamal, og tann norski 60 ár.

Nevnast kann, at íslendski upplýsingarfelagsskapurin eisini kom á føtur við, at hinir norðurlendsku felagsskapurin sendu fólk at leggja lag á.

Ein av útlendskum skeiðleiðarunum, Roke Lundgren verður í Føroyum ein mánað afturat, og hann er til reiðar at verða spurdur til ráðs.

Somu fólkini, sum nú hava verið á skeiði, skulu aftur á skúlabonk í heyst. Tey eru tá ikki liðugt útbúgving, men tey skulu einaferð verða tey, sum halda skeið í Føroyum.

UV hevur nøkur skeið á skránni afturat í ár. 6. juni verður skeið fyri álitisfólk og viku seinni verður eitt skeið, har kunnað verður um Arbeiðsloysisskipanina, almannaforsorg og fíggjarligu viðurskiftini hjá t.d. arbeiðsleysum. Ætlanin er m.a. at lýsa, hvørjar møguleikar fólk í fíggjarligari trongstøðu hava at gera gjaldsavtalur um húsalán.

Seinni í ár verður aftur eitt skeið, og tá fer Holger Arnbjerg at útgreina kanningina um lívikør føroyinga fyri nevndarlimum í fakfeløgum og øðrum.

randi



Nú eru góð ráð dýr...

Hvat gera tit, um bilurin verður skaddur á bilferðini...?
Jú, tit ringja til SOS international, og við hjálp av **Reyða Kortinum** rindar tykkara skrokktrygging óvæntaðu útreiðslurnar.
Minnist til at koma eftir kortinum, áðrenn tit fara. Kortið er ókeypis fyri bilar undir 3000 kg.

*Góða ferð*

TRYGGINGARSAMBANDIÐ FØROYAR
Tlf 14590 33090 48190 56190 72190 73890

